HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

30. mai 2017
Mál: 17/00497-3
Tygara skriv:
Viðgjørt: HH

**Uppskot til kunngerð um sigling undir Nólsoy, Skúvoy og Mykinesi til hoyringar**

Hoyringsfreistin er ásett til **týsdagin 27. juni 2017**.

Hjálagt er uppskot til kunngerð um sigling kring Ramsaroyggjarnar Nólsoy, Skúvoy og Mykines.

Endamálið við kunngerðini er at fyribyrgja, at fuglur verður órógvaður av bátum, sum sigla við nógvari ferð tætt fram við landi, serliga um summarið, tá fuglurin reiðrast.

Nólsoy, Skúvoy og Mykines vórðu útnevndar Ramsarøki í 2012, og eru gjørdar sonevndar Ramsarætlanir fyri hvørja av oyggjunum.

Eitt av høvuðstilmælunum í Ramsarætlanunum fyri allar tríggjar oyggjarnar er at avmarka sigling við nógvari ferð fram við landi, fyri at geva fuglinum so góðan frið sum gjørligt.

Serliga lundin er illa fyri aftan á fleiri ár, har mestsum ongar pisur eru komnar undan. Tí verður hildið neyðugt at verja hann so væl sum til ber.

Skotið verður upp, at frá 1. mai til hálvan august verður bannað at sigla skjótari enn 5 fjórðingar um tíman kring Skúvoy og á ávísum leiðum kring Nólsoy og Mykines.

Heitt verður á hoyringspartarnar um at lata **Heilsu- og innlendismálaráðnum**, t.e. himr@himr.fo møguligar viðmerkingar til hjálagda uppskot í seinasta lagi **týsdagin 27. juni 2017**. Hoyringspartarnir eru eisini vælkomnir at boða frá, um ongar viðmerkingar eru til uppskotið.

Kunngerðauppskotið liggur eisini tøkt á heimasíðuni www.himr.fo

Vegna Heilsu- og innlendismálaráðið

Hilmar Høgenni
deildarstjóri

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: himr@himr.fo